BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

28. januar 2025
Mál: 22/22133-112
Viðgjørt: TB

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-073/2024, eftir § 52a í Tingskipanini, frá Beini Johannesen, løgtingsmanni, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum, um lestrarpláss, sum verða boðin út summarið 2025.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógv lestrarpláss verða boðin út summarið 2025 innan miðnáms-, yrkis- og hægri útbúgvingar?

Svar

Til 1: Spurningurin um, hvussu nógv lestrarpláss verða boðin út eitt ávíst tíðarskeið, er ein spurningur, sum ikki er líka lættur at svara, sum ein í fyrstu atløgu kann halda. Orsøkin er tann, at útbúgvingarnar eru somikið ymiskar, at neyðugt er at taka nøkur fyrivarni, áðrenn komast kann fram at einum tali. Hetta talið er ymiskt alt eftir, nær hugt verður, tí praksis fyri upptøku og harvið eisini talið av lestrarplássum eru ymisk til ymiska tíð.

Hóast allar flestu útbúgvingar í Føroyum hava eina árliga upptøku, so eru tað summar útbúgvingar, sum hava dupulta upptøku, aðrar hava dupulta upptøku annað hvørt ár, og so eru aftur aðrar útbúgvingar, sum ikki taka lesandi ella næmingar inn á hvørjum ári.

Afturat hesum eru eisini gymnasialar útbúgvingar, har ein praktiserað upptøkutreyt er, at umsøkjarar, sum søkja inn, og sum lúka krøvini fyri upptøku, verða tikin inn á gymnasialu útbúgvingarnar. Hetta merkir, at um talið av umsøkjarum vaksa, so kann tað í prinsippinum hava við sær, at nýggir flokkar verða stovnaðir, sum harvið geva fleiri lestrarpláss. Um størri tilgongd er til yrkisútbúgvingarnar, er eisini møguleiki fyri at økja um lestrarplássini.

Tá tað er sagt, so kann sigast, at tað verður mett at verða á leið 856 lestrarpláss á teimum gymnasialu útbúgvingunum, 212 á yrkisútbúgvingunum, 20 innan klædna- og tilvirkisatstøði, 77 innan heilsu- og umsorgan, 192 lestrarpláss á teimum maritimu útbúgvingunum, 60 lestrarpláss á Hægri Námi, 260 á bachelorútbúgvingunum og 120 lestrarpláss á masterútbúgvingunum. Hetta gevur á leið 1797 lestrarpláss tilsamans.

Afturat hesum tølum eru eisini 25 lestrarpláss til hjánámslestur á Fróðskaparsetri Føroya, umframt ph.d.-lestur, sum ikki er skipað við árligari upptøku. Ivamál er um, hvørjar útbúgvingar verða bodnar út á Hægri Námi, og tí kunnu tey tølini verða øðrvísi, tá vit koma til summarið 2025. Eisini er vert at

nevna, at vit eisini hava yrkisútbúgvingar við lærutíð í Føroyum, men har skúlagongdin er í Danmark, og tískil heldur ikki er við í hesi uppgerðini.

Legg til merkis, at hesi tølini snúgva seg um lestrarpláss/kapasitet, og ikki upptøku á sjálvar útbúgvingarnar.

Hetta svarið má takast sum eitt vegleiðandi svar, og ikki eitt endaligt svar, sum lýsir allan veruleikan. Til tað krevst eitt størri greiningararbeiði, og hevði betri hóskað seg í einari skrivligari frágreiðing.

Niðanfyri er samlað yvirlit yvir lestrarpláss summarið 2025:

Lestrarpláss tilsamans	
Gymnasiala breytaskipanin	856
Yrkisútbúgvingarskipanin	212
Aðrar yrkisrættaðar útbúgvingar	20
Maritimar útbúgvingar	192
Heilsuskúlin	77
Hægri Nám	60
Bachelorútbúgvingar	260
Masterútbúgvingar	120
Lestrarpláss tilsamans	1797

Vinarliga

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður